gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Nýggjur virkisbygningur á Kambsdali

Elektrikaravirkið hjá Jóannesi Thomsen í Fuglafirði fer at flyta í nýggjan virkisbygning á Kambsdali til jólar

Ídnaður
Edvard Joensen

Elektrikaravirkið P/F Jóannes Thomsen í Fuglafirði byggir nýggjan virkisbygning á Kambsdali. Nýggi bygningurin verður 1.600 fermetrar til víddar í tveimum hæddum.

Væntandi fer hesin nýggi bygningurin at standa klárur til jólar. Grundin verður nú stoypt, og ráelementini verða so sett upp í summar. Síðan kemur innrættingin, sum teir ætla at verða lidnir við seint í heyst.

Sigurd Lamhauge, stjóri í fyritøkuni Jóannes Thomsen, sigur, at nú verður alt virksemið hjá felagnum savnað undir einum taki. Sum er arbeiðir fyritøkan í tveimum ymsum húsum í Fulgafirði, og har er eisini rættiliga trongligt,sigur hann. Eini 20 fólk arbeiða á virkinum, sum millum annað ger eltalvur og ymiskt stýrisystem til alivinnu.

Eitt, sum elvirkið hjá Jóannesi Thomsen ger nógv av, er undirvatnsljós og ljósstýringar til aliringarnar, sigur Sigurd Lamhauge. Eitt nú hevur virkið selt sína framleiðslu til alibrúk í Chile í Suðurafrirka, har teir mans eru og arbeiða, sigur hann.

Sum dømi um stýringarnar, virkið ger alistøðir og smoltstøðir, nevnir Sigurd Lamhauge, at smoltstøðin Sandá á Selatrað hevur fingið ta ivaleyst mest framkomnu stýringinga, sum finst, frá Jóannesi Thomsen.

Tann stýringin verður avgreidd við eini teldu og eini telefonlinju. Í grundini sama prinsippið sum Internetið, sigur Sigurd Lamhauge, stjóri á elektrikarafyritøkuni P/F Jóannes Thomsen í Fuglafirði.



*Farið er undir at stoypa grundina undir nýggja virkisbygninginum hjá elektrikaravirkinum hjá Jóannesi Thomsen á Kambsdali*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Feittfríar pannur og grýtur

Øll hugsa vit um mat – á ein ella annan hátt. Mong av okkum ynskja somuleiðis, at maturin, vit gera, inniheldur so lítið feitt sum møguligt.

Danska fyritøkan Gastrolux framleiðir serligar pannur, grýtur og annað til dagligu matgerðina. Tað sum er serligt við hesum køksamboðum er, at tað ikki er neyðugt at steikja matin í feitti. – Og hetta er nevnliga nakað, sum mong av okkum ynskja. Krista og Fríðbjørn Poulsen, sum umboðað Gastrolux í Føroyum, siga, at áhugin í Føroyum fyri úrdráttunum frá Gastrolux er ógvuliga stórur. Vit hava verið á fleiri sølusframsýningum kring landið, og áhugin millum tey vitjandi fyri okkara vørum hevur verið stórur, so vit gleða okkum at sýna fram í SMS, sigur Krista. Framsýningin hjá Kristu og Fríðbjørn av Gastrolux úrdráttum verður á Torginum mikudegnum 9. til leygardagin 12. mai.



## Mordarin aftur á leysum fóti í Sjónleikarhúsinum

Sjónleikurin, klassikarin, Músafellan eftir Agatha Christi hevði fyri stuttum sínar síðstu sýningar. Men vegna góða undirtøku er nú ætlanin hjá at taka leikin uppaftur.

Byrjað verður hósdagin 10. mai. kl. 20.00. Síðan verður leikt kl. 17.00 leygardag. Tvær sýningar verða sunnudag, fyrst kl. 16.00 og síðan kl. 19.00.

Fyriskiparnir, leikbólkurin Spírar, siga at tey taka leikin uppaftur tí at nógvar umbønir hava verði um hetta og fólk hava ein rætt til at vita hvør mordarin í Músafelluni er.

Billettir fáast á kunningarstovuni í Havn og 1 tíma áðrenn sýning við dyrnar.

## Ballettframsýning

Tann árliga ballettframsýningin hjá Yndi verður mikudagin 9. mai 2001 kl. 19.30.

Aldursbólkurin hjá teimum, sum eru við, er úr seks árum og uppeftir. Leiðari fyri ballettina Yndi er, eins og hini árini, Elsa Maria Bærentsen.

Atgongumerkir til mikudagin tiltakið hjá Yndi eru í Norðurlandahúsinum.

# MB-Tours — nýggj ferðaskrivstova

Nýggjasta ferðaskrivstovan á føroyska marknaðinum er MB-Tours. Dagliga halda teir til á Bryggjubakka og fáast serliga við at selja vanligar ferðaseðlar, charterferðir suðureftir og annars alt, sum hevur við ferðavinnu at gera.

Mouritsen Bussar, sum í mong ár hevur havt busskoyring, bæði í Føroyum og í útlondum, eigur MB-Tours. Magni V. Mouritsen, sum er dagligur leiðari hjá MB-Tours, sigur, at tað var eitt natúrligt lop, tá teir í juli mánað seinasta ár lótu ferðaskrivstovu upp. – Vit hava í fleiri ár skipa fyri bussferðum í Føroyum og útlandinum. Oftast er hetta gjørt saman við øðrum ferðamannastovum, sigur Magni. Ein onnur orsøk var tann, at Magni hevur tikið útbúgving innan ferðavinnu, og sá møguleikar í hesi vinnu í Føroyum.

Hann letur væl at søluni higartil. – Vit selja fleiri og fleiri ferðir, og samstundis fáa vit fleiri og fleiri fyrispurningar um ferðir av landinum, sigur Magni. Mest vitjaðu ferðavinnustøðini hjá føroyingum eru serliga Danmark og annars charter til londini í suðureuropa summarfrítíðini. Og hósdagin 10. og leygardagin 12. mai er møguligt at vitjað sølubásin hjá MB-Tours á Torginum í SMS. Í samband við søluframsýningina hava teir nøkur serlig tilboð á básinum.

Afturat MB-Tours og Gastrolux verður Mótahandilin Vero Moda verður á torginum mikudagin og hósdagin, við nógvum nýggjum og spennandi summarvørum.

Hósdagin er SMS opið til 19., meðan tað er stongt fríggjadagin, Dýra biðidag. Tó hevur Hornið opið frá kl. 14.00-23.00



gult5 cyan5 magenta5 svart5



Svenski sendiharrin í Keypmannahavn:

# Vil betra samstarvið við Føroyar

**Fyri fyrstu ferð í nærum hálva øld hevur svenski sendiharrin í Keypmannahavn vitjað í Føroyum. Sendiharrin Carl-Magnus Hyltenius heldur, at samstarvið millum Føroyar og Svøríki eigur at betrast bæði á mentanarliga og á vinnuliga økinum**

SENDIHARRAVITJAN
*Stefan í Skorini*

– Føroyar eru ein partur av norðurlendska samstarvinum, sum vit í Svøríki eiga at hugsa meira um, enn vit hava gjørt higartil, sigur Carl-Magnus Hyltenius, ið hevur verið á vitjan í Føroyum seinastu dagarnar.

Vitjanin er komin í lag í sambandi við, at Bjørn á Heygum er útnevndur generalkonsul í Føroyum, eftir at Eyðun á Rógvi Olsen hevur lagt frá sær.

Svøríki hevur havt eitt konsulat í Føroyum síðan 1930, men seinastu ferð at svenski sendiharrin var á vitjan var í 50-unum.

Hetta heldur Carl-Magnus Hyltenius vera alt ov long tíð, og tí er hann glaður um at fáa møguleikan at vitja Føroyar.



*Carl-Magnus Hyltenius fekk høvi at práta við Føroya løgmann, Annfinn Kallsberg, á vitjanini í Føroyum, og hann sigur seg vilja virka fyri at berta sambandið millum Føroyar og Svøríki, kanska serliga á mentanarliga økinum*

*Mynd: Jan Müller*

## Sambandið skal betrast

Svenski sendiharrin heldur, at sambandið millum Føroyar og Svøríki kundi verið betri, og hann sigur seg vera sinnaðan at kanna møguleikarnar fyri at betra og menna hetta sambandið. Tað kann vera bæði á vinnuliga og á mentunarliga økinum.

Í sambandi við at betra mentanarliga sambandið hevur Carl-Magnus Hyltenius tosað við Helgu Hjørvar, stjóra í Norðurlandahúsinum, um at fáa lag okkurt slag av samstarvi landanna millum. Sendiharrin hevur eisini hoyrt um ætlanirnar hjá Norðurlandahúsinum við tí stóru listastevnuni.

Sendiharrin sær avgjørt ein tørv á, at Føroyar og Svøríki hava meira mentanarligt samband. Hetta kundi verið gjørt við at skipa soleiðis fyri, at listafólk, sjónleikabólkar og onnur kundu verið send til Føroyar, sum gjørdi tað sama.

– Eg fari tí at kanna, um svenska sendistovan í Keypmannahavn kann gera nakað fyri at menna sambandið og samstarvið á hesum økinum, sigur Carl-Magnus Hyltenius.

Sendiharrin greiðir frá, at hansara mál við hesi ferðini er at samband í lag við føroyingar og at styrkja tað, sum er frammanundan.

Harafturat heldur hann tað vera ógvuliga týdningarmikið við persónligum sambandi við fólk í Føroyum, og tað fær hann ikki, um hann ikki sjálvur setir fótin á land í Føroyum.

## Gevandi ferð

Carl-Magnus Hyltenius sigur seg hava fingið ógvuliga nógv burturúr ferðini til Føroyar, og at hann nú hevur sett seg betur inn í føroysk viðurskifti.

– Eg havi prátað við løgmannin, løgtingsformannin og ríkisumboðið, tá eg fekk høvi til tess undir hátíðarhaldinum, og eg eri tí betri vitandi um innanhýsis føroysk viðurskifti enn áðrenn vitjanina, sigur Hyltenius. Harafturat er sendiharrin aovfarin av øllum tí, Føroyar hava at bjóða og vakurleikanum í landinum.

Áðrenn Carl-Magnus Hyltenius fór avstað aftur vitjaði hann nakrar verksmiðjur, ið framleiða til útflutning, fyri at fáa eina ímynd av føroyska vinnulívinum.

Tað er eisini neyðugt, at svenski sendiharrin í Keypmannahavn kennir til allar partar av danska ríkinum, sum er hansara øki.

– Málið er at menna sambandið okkara millum, og tí er tað umráðandi at hava fólk á staðnum at taka sær av áhugamálum Svøríkis, sigur Carl-Magnus Hyltenius at enda.

# Elektronikhandil flytir inn í Hotel Djurhuus

**300 ára gomlu húsini við síðuna av Café Natúr skulu í framtíðini hýsa einum handli, sum skal uppfylla krøvini um elektroniskar ágóðar, ið nútíðar menniskjað setur**

FLYTING
*Stefan í Skorini*

Elektroniktænastan Delta fer í framtíðini at húsast í gamla Hotel Djurhuus yvir av Cafe Natúr á Áarvegnum. Í løtuni verður arbeitt við at umvæla og umbyggja húsini, sum Brandur í Dali eigur.

Brandur í Dali, eigari av Delta, sigur, at hann væntar at flyta inn í húsini um ólavsøkumundi, men enn er eitt sindur óvist.

– Húsini eru ógvuliga gomul, og tí skal mann vænta tað óvæntaða, sigur Brandur í Dali.

Klædningurin verður útskiftur, og onkrar broytingar verða gjørdar inni í húsunum, men ikki nakrar stórvegis broytingar, tí tað hevði verið synd at oyðilagt eini so gomul hús, heldur Brandur.




*Húsini til vinstru fyri Cafe Nátúr, Hotel Djurhuus, skulu nú hýsa eini elektroniktænastu*

*Mynd: Jan Müller*

## Einki handilsvindeyga

Partar av húsunum eru nærum 300 ára gamlir, sigur Jórun í Dali, arkitektur, ið tekur sær av umbyggingini. Tí sleppur eigarin ikki at broyta húsini, sum honum lystir.

Hetta hevur tó ikki verið nakar trupulleiki, tí Brandur í Dali sigur seg ikki hava havt ætlanir um at broyta húsini stórvegis. Húsini eru ikki friðað, men Fornminnissavnið hevur verið uppi í leikinum, og húsini eru eisini umfatað av eini býráðssamtykt, ið setir treytirnar við øll tey gomlu húsini úti á Reyni.

Brandur sigur, at tá fyritøka hansara Delta flytir oman í hesi hølini, fer hann at hava tvær ferðir so nógv gólvpláss til sítt virksemi við sølu og umvæling.

Handilin fer tó ikki at hava nakað veruligt handilsvindeyga, tí hesum forðar samtyktin fyri. Hinvegin heldur eigarin, at handilin nú liggur betur fyri enn áður, og tað er ein stórur fyrimunur.

Handil hevur altíð verið í teimum gomlu húsunum, so Brandur heldur lív í tí siðinum. Seinasta umbyggingin av húsunum var í 1901, tá tey fingu dagsins skap. Hinvegin er vegurin framvið húsunum hækkaður. Fyrr var niðasta hæddin yvir veghædd, men nú er vegurin niðanfyri kjallaran.